# Bilar

Nr. 241 • hósdagur • 13. desember 2001 • 75. árg.


# Fyrstu myndirnar av Volvo XC90






Volvo XC90 er tann størsti í nýggju XC røðini hjá Volvo. Ongin ivi er um at talan er um ein ektaðan Volvo

**Volvo Cars almannakunngera nú fyrstu myndirnar av einum nýggjum SUV, Sport Utility Vehicle. XC90 verður tann størsti í nýggju XC røðini hjá Volvo. Verkætlanarleiðarin hjá Volvo, Hans Wikman, sigur at endamálið hevur verið at gera bilin til ein tann mest spennandi og trygga bilin á marknaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá Volvo koma á marknaðin við einum nýggjum bili, er eitt av endamálunum at sláa fast at teir ganga á odda á trygdarøkinum. XC90 er onki undantak, hvat viðvíkur aktivari og passivari trygd. Til dømis hava teir fleiri nýggjar tekniskar loysnir, um tað skuldi hent at bilurin fer út av vegnum og rullar fleiri ferðir runt.

## Sjey sitipláss

Tað nútímans designi, saman við góða plássinum innan, gevur bestu fyritreytir fyri einum praktiskum bili. Hann kann hava upp til sjey sitipláss, har øll tey ferðandi venda frameftir. XC90 fæst við 5 og 6 syl. bensinmotorum, og teimum nýggju 5 syl. dieselmotorunum hjá Volvo, ið allir eru turboløddir.

## Framleiðast í Torslanda

Framleiðslan byrjar í 2002 á verksmiðjuni hjá Volvo Cars í Torslanda í Svøríki, har fleiri av teimum størru Volvo bilunum verða framleiddir. Teir vænta at 65 prosent av XC90 fara til norðuramerikanska marknaðin, 25 prosent til Evropa og 10 prosent til onnur lond. Bilurin verður alment sýndur fram á Detroit Motorshow í januar.

*Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S*




Volvo XC90 er ein SUV, við upp til sjey sitiplássum



ÚT AT KOYRA

# Góðtaka vit at persónliga frælsið verður skert?

**Null-hugsjónin bleiv samtykt við framtíðini í huga, men longu nú vita sviar, hvørjar atgerðir skulu verða gjørdar, til tess at hugsjónin kann blíva veruleiki. Null-hugsjónin er fyrst og fremst ein spurningur um at vilja, og at góðtikið verður, at tað persónliga frælsið verður nakað skert**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Tað kostar nógvan pening at gera t.d. miðteigar á vegirnar, soleiðis at bilarnir ikki kunnu renna saman, og at taka burtur allar forðingar við vegjaðararnar. Men av tí at ferðsluskaðarnir í Svøríki árliga kosta umleið 20 milliardir krónur, er eisini nógvur peningur at spara. Tann likamliga líðingin eigur at viga meira enn peningur

*Brot úr fyrilestri hjá Petur J. Sigvardsen starvsnevndarformanni í RFF*




*Nú eru fýra ár liðin síðan Null-hugsjónin varð samtykt í Svøríki. Vónandi verður hon eisini samtykt her hjá okkum*

# Mini Cooper - nútímans bilur í gomlum stíli




Mini Cooper. Tað hevur eydnast at skapa ein nútímans Mini við allari sjarmuni frá tí gamla



*Innan er alt sum í gomlum døgum við ferðmátara í miðuni á instrumentborðinum og snúningsteljara á rattstammuni*



*Nýggi Mini er væl størri enn tann upprunaligi*

**Tá BMW seldi Rover, vildu teir ikki av við Mini. Tað vísir seg at áhugin fyri bilinum er størstur millum tey sum vuksu upp tá Minibilarnir vóru uppá sítt besta**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggi Mini er nakað størri enn tann upprunaligi. Hóast talan er um ein nútímans bil, hava teir nógv til felags, bæði uttan og innan. Mini Cooper er ein dýrur bilur, sum í Danmark kostar umleið 275.000 krónur. Bilurin verður ikki keyptur orsakað av at hann er sera rúmligur ella praktiskur, men av teimum sum ynskja sær ein annarleiðis bil. Eisini fleiri av teimum sum vuksu upp tá Minibilarnir vóru uppá sítt besta, hava stóran áhuga í bilinum.

## Vekjur ans

Allar útgávurnar hava 1,6 ltr. 16V motorar í ymiskum støddum. Mini hava 90 hk, Mini Cooper hava 115 hk og Cooper S hava 163 hk. Sum í gomlum døgum er ferðmátarin í miðuni á instrumentborðinum og snúningsteljara á rattstammuni. Bilurin sær gott út og vekjur ans har hann kemur. Fyrsti Mini kom í 1959, og varð á marknaðinum í 40 ár.

## Nýggjur Ibiza



Á eini bilaframsýning í Italska býnum Bologna í hesum døgum, er ein nýggjur Seat Ibiza. Bilurin hevur sportligar koyrieginleikar og fæst við motorum frá einum 3 syl. 1.2 ltr. við 65 hk til 1.9 TDI við 130 hk

*Kelda: Motor Magasinet*

## Fyrsti 1 litur bilur



Sambært stjóranum í VW konsernini, Dr. Ferdinand Piëch, koma teir skjótt við einum VW 1L, ið koyrir 100 km fyri hvønn litur av bensini. Prototypan skal vera klár til 16 apríl 2002, tá hann fer frá sum stjóri.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Lada í Danmark



Danska bilasamtakið, Nic. Christiansen, ið umboða fleiri bilmerkir, hava eisini fingið russisku Lada bilarnar í teirra vøruskrá. Skráin fevnir um Lada Niva, Lada 11O sedan, 111 stationcar og 112 hatchback.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*